Vænta framvegis at suðuroyingar spæla við

Landsstýrið væntar at suðuroyingar vilja spæla við. Men vilja kommunurnar í Suðuroy ikki tað, kann landsstýrið ikki byggja røktarheim, men tað kann undir øllum umstøðum flyta miðnámsskúlan og heilsuskúlan til Hovs

SKÚLAR OG RØKTARHEIM
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

– Vit kunnu ikki ikki byggja røktarheim í Suðuroy ímóti viljanum hjá kommununum. men vit kunnu byggja skúlar har vit vilja. Men vit vóna framvegis, at kommunurnar í Suðuroy taka undir við okkum, tí hetta er tann besta loysnin fyri oynna, sigur Løgmaður

Vit vænta framvegis, at kommunurnar í Suðuroynni síggja tað skilagóða í hesum og vilja spæla við.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, er sannførdur um, at tann besta loysnin fyri Suðuroynna er at taka undir við ætlanini hjá landsstýrinum um at flyta ætlaða miðnámsskúlan í Vági til Hovs og at byggja hann í einum depli har, saman við heilsuskúlanum, sum annars var markaður til Tvøroyri.

Afturfyri skal so eitt røktarheim til 35 fólk byggjast í Vági á stykkinum, sum nú er grivið út til miðnámsskúla.

Hendan ætlanin sá dagsins ljós 11. septembr, tá ið varð løgd fyri Vágs Býráð, sum ógvuliga avgjørt vísti henni frá sær, serliga við atliti til at flyta skúlan.

Men fyrsta november skrivaðu teir báðir Landsstýrismenninir, Hans Pauli Strøm og Jógvan á Lakjuni, øllum kommunum í Suðuroy bræv, har teir gjørdu greitt, at landsstýrið stóð við ætlanina og teir vónaðu, at kommunurnar tóku undir við henni, so at hon kundi gerast veruleiki.

Eftir tíðarætlanini hjá samgonguni, skulu miðnámsskúlin, heilsuskúlin í Hovi og røktarheimi í Vági standa liðugt í 2007.

Vit hava spurt løgmann um hetta ikki beinleiðis er at leggja seg út í valstríðið uppundir kommunuvalið í dag.

Tað undrar hann ikki, at onkur uppfatar tað soleiðis. Men hann sigur, at tað passaði seg soleiðis og tað var ikki soleiðis, at brævið til kommunurnar skal skiljast.

– Við hesum brævinum vildu vit gera púra greitt, at hetta var ikki eitt tomt lyfti. Hinvegin ásannar løgmaður eisini, at samgongan átti at havt sett seg í sambandi við allar kommurnar frá fyrsta degi.

Vónandi vilja suðuroyingar spæla við

Annars vónar løgmaður framvegis, at kommunurnar í Suðuroynni vilja spæla við, tí hann er sannførdur um, at hetta er tann besta loysnin fyri Suðuroynna.

Kortini ásannar hann, at vilja kommunurnar í oynni ikki vilja vera við í eini ætlan um at byggja røktarheim, verður onki røktarheim bygt, tí kommunurnar skulu betala helvtina av kostnaðinum.

– Sostatt kann landsstýrið ikki byggjarøktarheim av sínum eintingum of senda rokningina til kommununar, staðfestir løgmaður.

Í brævinum til kommununar í Suðuroy ásannar landsstýrið, at Suðuroyggin er í eini serligari støðu og tí er landsstýrið sinnað at finna ein figgingarhátt, sum er so lagaligur, at tað verður figgjarliga gjørligt hjá øllum kommununum í oynni at vera við.

Í hesum liggur ikki at kommunurnar sleppa undan at betala sína helvt.

– Hetta skal skiljast so, at landsstýrið er sinnað at finna eina skipan, har avdráttartíðin hjá kommununum kann toyggjast yvir so nógv ár, at tað verður figgjarliga gjørligt hjá kommununum.

Men hevur Vágs Kommuna brúkt pengar uppá stykkið til miðnámsskúlan, kunnu teir pengarnir sostatt verða ein partur av tí, sum kommunan annars skuldi betalt til eitt røktarheim.

Spurningurin er so, hvat hendir, at um kommunurnar í Suðuroy ikki taka undir við ætlanini.

–Vit vóna og vænta framvegis, at málið verður loyst í sátt og semju. Og vera kommunurnar ikki við, kann onki røktarheim gerast.

Hinvegin eru skúlarnir báðir ein landsuppgáva burturav og teir kann landið sostatt byggja, har sum landið vil.

– Og vilja kommunurnar ikki vera við, er tað avgjørt ein møguleiki at landið einsamalt tekur avgerð um at byggja skúlarnar í Hovi og at Vágs Kommuna so ístaðin fer endurgjald fyri útreiðslur, sum hon hevur havt av stykkinum til miðnámsskúlan.

Hann leggur tó dent á, at ongin avgerð er tikin um hetta í landsstýrinum, men vit standa fast um, at frágasta loysnin fyri miðnámsskúlan, heilsuskúlan og røktarheimi er tann loysnin, sum vit hava skotið upp.

Stór óvissa á Tvøroyri

Á býráðsvalinum á Tvøroyri er spurningurin um javnaðarflokkurin fær meirilutan einsamallur og um tað eydnast sambandsflokkinum at fáa tveir býráðslimir

BÝRÁÐSVAL
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Valstríðið á Tvøroyri hevur verið merkiliga deydligt, men um tað eru nervar ella taktiskt spæl, skal vera ósagt

Býráðsvalið á Tvøroyri verður meiri spennandi hesuferð, enn tað hevur verið leingi. Javnaðarflokkurin hevur havt trý umboð í býráðnum av teimum sjey, sum hava verið. Men ongin dylir fyri, at teir hava sett nøsina upp ímóti at fáa fjórða mannin hesuferð og sostatt meirilutan einsamallur.

Jokarin í hesum royndunum er Kristin Michelsen, sum akkurát er komin upp í javnaðarflokkin og sum fekk nógvar atkvøður seinast.

Men tað dylist heldur ikki, at tað hevur verið eitt sera umstrítt flokksskiftið, tá ið Kristin Michelsen kom uppí javnaðarflokkin, tí hann er kendur tjóðveldismaður og tað eru eisini tey, sum stúra fyri, at hetta kann koma at geva baksláttur, at hann nú knappliga er at finna í javnaðarflokkinum.

Hinvegin hevur sambandsflokkurin sett øll segl til fyri at fáa tvey umboð í býráðið hesuferð. Jaspur Vang hevði eitt sera gott løgtingsval, har hann enntá varð varamaður hjá Johan Dahl í løgtinginum og sambandsmenn vóna, at hendan effektin fer at verða munurin á býráðsvalinum í dag. Hinvegin er Finnleif Guttesen býráðslimur og hann hevur eisini verið borgarstjóri í tvey ár.

Á uttanflokkalistanum verður mett, at Bergur Bærendsen og Dan Nielsen hava góðan møguleika at verða afturvaldir, men eisini Karolina Enni, kann vísa seg at verða drúgv.

Í hesum valskeiðnum hevur uttanflokkalistin sitið í andstøðu og tað er ikki ein leiklutur, sum hevur hóva teimum serliga væl, tí teir føla at teir hava fingið ov lítla ávirkan á tað, sum fyriferst í býráðnum.

Tí eru tað eisini fleiri røddir frammi um at í næsta valskeiði skal býráðið helst koma burturfrá gamla mynstrinum við meiriluta og minniluta. Ístaðin skulu allir flokkar við í eina samgongu.

Men spurningurin er, hvussu verður, tá ið avtornar, serliga tá ið borgmeistari skal veljast. Tá ið hendan samgongan varð skipað, var tað ein stórur knútur at loysa og tað endaði við, at Finnleif Guttesen og Kristin Michelsen býttu valskeiðið ímillum sín.

Tað er ringt at fáa nakrar ábendingar um, hvørjir evni eru til borgarstjóran. Fær javnaðarflokkurin borgarstjóran, kann tað verða Kristin Michelsen. Men hinvegin er heldur ongin ivi um, at tað fer at smakka nógvum javnaðarvejarum illa at velja hann til borgarstjóra, nýkomin í javnaðarflokkin.

Eitt annað gott boð er so Pauli Einarsson, sum er gamal í garði í javnaðarflokkinum. Sverri Midjord liggur altið framvið, men hann er farin um tey sjeyti og spurningurin er um javnaðarflokkurin ikki heldur velur ein borgarstjóra við framtíðini fyri sær.

Tað skilst eisini, at heldur ikki sambandsflokkurin hevur nakað greitt borgarstjóra evni frammanundan. Har verður tað helst avgerandi, hvør fær flestar atkvøður.

Men sambandsflokkurin kann skjótt koma í eina lyklastøðu, tí fær javnaðarflokkurin tríggjar mans, kann sambandsflokkurin gerast tungan á vágskálini og tað er uttan iva ein leiklutur, sum teir fara at gera fulla nyttu av.

Hinvegin verður ikki mett serliga sannlíkt, at samgongulistin fær býráðsformannin. Men Eisini samgongulistin kann gerast tungan á vágskálini, fær javnaðarflokkurin bara tríggjar mans í býráðið, so tað kann væl henda, at borgarstjórin verður ein spurningur um, hvør dugir at spæla síni kort best, samgongulistin ella sambandslistin.

Um tað er alt tað taktiska spælið ella nervar, sum eru orsøkin, skal vera ósagt, men ein sannroynd er tað, at valstríðið á Tvøroyri hevur verið merkiliga deydligt.

ítróttur

Nr. 214 • týsdagur • 9. november 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Longri landskapping og ongan summarsteðg

FSF vil nú hava feløgini at taka støðu til, um kappingarárið skal broytast soleiðis, at fleiri umfør skulu spælast í landskappingini, færri í steypakappingini og at summarsteðgurin skal strikast

FÓTBÓLTSÁRIÐ
Jákup Mørk

Tað er ein stórur spurningur, sum Fótbóltssambandið fer at leggja fyri fótbóltsfeløgini á árliga eftirmetingarfundinum, sum verður leygardagin. FSF fer at leggja fyri feløgini uppskot um, at fótbóltskappingin verður radikalt broytt, um sammett verður við tað, sum hevur verið galdandi mongu tey seinastu árini.

Tá ið landsliðið var í Sveis fyrst í september, segði Bjarki Mohr, formaður í kappingarnevndini, at møguleikin at strika summarsteðgin, økja um umførini í landskappingini og sleppa bólkaumfarinum í steypakappingini hevði verið umrøddur í Fótbóltssambandinum. At møguleikin hevði verið umrøddur komst ikki minst av, at tað leingi hevur verið mett, at tað er alt avgerandi fyri menningina av føroyskum fótbólti og harvið møguleikanum at rokka betri úrslitum í altjóða kappingum, at spælararnir heima á landi eru við í fleiri tøttum og týdningarmiklum dystum.

Danski leisturin

FSF fer at leggja uppskot um broytingar fyri feløgini nú leygardagin. Tilfarið, sum skal viðgerast á fundinum, verður sent feløgunum undan fundinum. Millum tilfarið verður fullfiggjað uppskot um broytingar í kappingini.

Um tað fer at vísa seg, at feløgini eru sinnað at taka undir við nýggjari skipan, so verður kappingin broytt longu í vár. Um feløgini ikki verða sinnað leygardagin at taka undir við uppskotinum, so er tað lítið sannlíkt, at talan verður um serligar broytingar næsta ár. Skotbráðið frá ársaðalfundinum og til kappingarbyrjan verður ov stutt at gera broytingar í.

Um uppskotið hjá FSF fer at vinna frama, so fer føroyska landskappingin at líkjast henni í Danmark. Har er tað soleiðis, at feløgini í hvørjum kappingarári hittast tríggjar ferðir í landskappingini. Tað vil siga, at feløgini móti summum móstøðuliðum spæla tvær ferðir á heimavølli og eina ferð á útivølli, og móti øðrum spæla tvær ferðir á útivølli og eina ferð á heimavølli.

Í nýggja uppskotinum verður lagt upp til, at tað fyrsta av teimum 27 umførunum í landskappingini verður spælt 2. páskadag, sum verður 26. mars, og at síðsta umfarið verður spælt 27. oktober. Í ár var tað fyrsta av átjan umførum 25. apríl, og síðsta umfarið var 2. oktober.

Um tað skal ganga upp við 27 umførum í landskappingini í staðin fyri átjan, so verður neyðugt eisini at gera aðrar broytingar. Ein er, at bólkaumfarið í landskappingini verður strikað, og ein onnur er, at summarsteðgurin í landskappingini verður strikaður.

Í steypakappingini er ætlanin, at tað skal spælast eftir cup skipanini frá fyrsta umfari av. Tjúgu feløg eru, og sekstan teirra skulu taka lut í áttandapartsfinaluni. Tað vil siga, at átta feløg skulu dystast um fýra pláss. Í Danmark eru feløgini flokkað eftir styrki, soleiðis at tey bestu ikki eru við í landskappingini beinanvegin. Enn er ikki greitt, hvussu tað verður við hesum í føroysku steypakappingini.

Hjá feløgunum, sum hava luttikið í Europa Cup og/ella steypafinaluni, hevur summarsteðgurin seinastu árini verið lítil ella eingin. Um tað eisini skal spælast í juli í landskappingini, so verður neyðugt við fleiri justeringum orsaka av Europa Cup. Hetta verður ikki mett at gerast nakar stórur trupulleiki.

Í nýggja uppskotinum verður lagt upp til, at tað fyrsta av teimum 27 umførunum í landskappingini verður spælt 2. páskadag, sum verður 26. mars, og at síðsta umfarið verður spælt 27. okt.

Nýggj Pizzacafé mitt í býnum

Matskrá
Vit hava 32 ymisk sløg:

Vegetariana (Vegetar pizza) DØMI
Tomatsós, ostur, soppar, piparfrukt, leykur, mais og oregano

Maradona (sera sterk) DØMI
Tomatsós, ostur, oksakjøt, skinka, flesk, chilli og oregano

Italia '90 DØMI
Tomatsós, ostur, oksakjøt, pepperoni, skinka og oregano

Italia Speciale (Luxus pizza) DØMI
Tomatsós, ostur, oksakjøt, skinka, flesk, mais, rækjur, leykur, soppar og oregano

Pizza Jalapeño (sera sterk) DØMI
Tomatsós, ostur, kebab, salat, dressingur, japaleñochilli og oregano

Pizza Tórshavn DØMI
Tomatsós, ostur, kebab, flesk, leykur, dressingur og oregano

Heimagjørt pitabrey DØMI
Kebab, salat og dressingur
Vel ímillum:
Thousand Island, Creme Fraiche og Hvítleykadressing

TIL BØRN
Pizza Nemo DØMI
Tomat, ostur, skinka og grillpylsa
Pizza Shreek DØMI
Tomat, ostur, skinka og oksakjøt

VIÐ EKTAÐUM ITALIENSKUM PIZZA v.m.

PIZZA café Kheops

ALT ER HEIMAGJØRT
og bakað í steinovni

Opið er:
Mánadag - Hósdag
17.00 - 23.00
Fríggjadag - Leygardag
17.00 - 24.00
Sunnudag
17.00 - 23.00

TLF 312290

Eisini ber til at bíleggja út av húsinum

Føroya Bjór